

# »MÍN MEINING«

Í teignum »MÍN MEINING« sigur Pauli Ellefsen sína hjartans meining um ymisk samfelagslig viðurskifti. Pauli Ellefsen var løgtingsmaður frá 1974-90. Hann var fólkatingsmaður frá 1977-87 og frá 1988-90. Hann var Føroya Løgmaður frá 1981-85 og hevði tá farloyvi úr Fólkatinginum. Hann var formaður Sambandsfloksins frá 1974-90. Pauli er útbúgvin fjarritari, handilsskúlaútbúgving HD og løggildur grannskoðari. Hann hevði í nógv ár egið grannskoðaravirki

# Fólkaskúlin – ne

## Mín meining



Pauli Ellefsen

Reaktiónin, ella bakslátturin, upp á Pisakanningina hevur higartil millum tey klóku fyrst og fremst verið eitt kjak um fleiri undirvísingartímar ella ikki. Lítið og onki um hvussu tímarnir gerast betri – teir tímar, tá týðandi partur av barlastini verður løgd niður í okkara børn. Okkara fremstu menn halda framvegis, at ein kann byggja heimsins besta samfelag oman á heimsins næstringasta skúla.

### Hugburðsbroyting er neyðug

Vit føroyingar verða noyddir til at rista av okkum allar minnilutakenslur yvir fyri útlendingum, ikki minst dønum og øllum tí, sum danskt er. Fyri 30 árum síðan var tað beinleiðis tápuligt at rokna við, at vit »over night« kundu sleppa danska tilfarinum og beinan vegin fara yvir til føroyskt tilfar. Kunnleikin til danskt hevur víðkað okkara sjónarring. Danir hava viðurkent, at danska málið er í lagi heima við hús, men alt ov lítið at hava við sær út í heim. Teir byrja nú at undirvísa teimum elstu bólkunum í og á enskum í teirra fólkaskúla. Alt fleiri donsk virksemi nýta enskt, eisini í Danmark. Vit halda framvegis at føroyskt er eitt heimsmál. So tungt tað enn kann tykjast, verða vit eisini noyddir til at ásanna, at lítla tabellin, matematiskir, kemiskir og fysiskir formlar geva nøkunlunda somu úrslit á útlendskum sum á føroyskum máli. At hóast føroyska náttúran er annarleiðis, so eru tær grundleggjandi náttúrulógirnar nøkunlunda eins og í útlondum.

### Bygnaðurin ella strukturin

í fólkaskúlanum má broytast. Skúlin eigur at verða býttur í tvær lodrættar súlur. Onnur súlan skal fevna um føroyska málið, søguna og tað sum serføroyskt er. Her skulu vit sjálvsagt menna fullgott føroyskt undirvísingartilfar. Hin súlan skal fevna um allar aðrar lærugreinar. Hendan súlan eigur at skerast vatnrætt í tríggjar flísar. Til niðastu flísuna skulu vit menna fullgott føroyskt undirvísingartilfar – eisini við umseting - til flestu lærugreinar. Til miðflísina skulu vit – um føroyskt tilfar ikki er tókt - útvega tað besta undirvísingartilfarið á donskum máli. Til ovastu flísina skulu vit hava fatur á tí allar besta undirvísingartilfarinum á enskum máli sum finnist. Hugsi ikki minst um nýggjasta elektroniska tilfarið, eisini til »interaktiva« undirvísing, sum nú vinnur fram.



Sosialurin

### Undisvísingaramboð skulu útvegast

– ikki komandi summar men - beinan vegin. Tað var gamalt føroyskt fyrst at útvega spakan, áðrenn ein byrjaði at grava, og ikki umvent – fyrst at útvega talvu og krit, seinni blýantin, áðrenn ein byrjaði at skriva. Í dag krevjast onnur og nýggjari undirvísingaramboð. Teir skúlar, sum ikki longu hava tað, skulu hava breiðband og tráðleyst samband inni á skúlanum. Ein flatskermur av rímuligari støddverður hongdur upp í hvørt bólkarúm, og rætta talið av printarum og neyðugur goymsludiskil verður útvegað tí einstaka skúlanum. Ein berbar telda og ein geymi verða lætin øllum lærara- og fólkaskúlanæmingum, øllum lærarum og starvsfólkunum í skúlaumsitingini. Ein samlað bílegging upp á einar 7000 teldur gevur ein sera rímuligan stykkjaprís. Teldan skal hava »tablet« eginleikar og tey røttu standardforritini,